Q

# Starv sum fyrstilærari í Sumbiar skúla

Undirvísingarstýrið sóknast eftir einum dugnaligum leiðara, ið hevur áhuga fyri námsfrøðiligari og fakligari menning og hegni at átaka sær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum.

Starvið sum fyrstilærari í Sumbiar skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2024. Í Sumbiar skúla eru 35 næmingar innskrivaðir í 1. - 7. flokki skúlaárið 2023-24. Fýra lærarar umframt skúlaleiðaran starvast í skúlanum.

**Um starvið**

- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning
- at fremja eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at starvsfólk skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at virka fyri trivnaði og góðum samstarvi við atliti at næmingum og starvsfólki skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- at umsita fíggjar- og rakstrarstýring skúlans.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar skulu hava

- læraraútbúgving
- viðkomandi starvsroyndir
- førleika at taka neyðugar avgerðir, at virka fyri trivnaði og einum mennandi læruumhvørvi
- leiðsluútbúgving ella fara undir útbúgving innan leiðslu.

**Setanarviðurskifti**

Setanarøkið er undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum við fyribils tænastu í Sumbiar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er í løtuni flokkað í lønarflokki 31.3, men verður sambært semju millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag frá 1. oktober 2024 flokkað sum skúlastjórastarv í lønarflokki 33.1 ella 34.1, treytað av næmingatali skúlans pr. 1. september 2024. Verður tænastumaður settur í starvið, varðveitir viðkomandi tænastumannasetanina.

**Umsóknir**

Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og viðmælum skal verða Undirvísingarstýrinum í hendi í seinasta lagi 19. apríl 2024 kl.12.00.

Umsóknin verður stílað til:

Undirvísingarstýrið
Postsmoga 9

Hoyvíksvegur 72
110 Tórshavn
ella við t-posti: uvs@uvs.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jónleif Johannesen, fulltrúa, tlf. 555062.

*Undirvísingarstýrið er eind undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Undirvísingarstýrið tekur sær av fyrisitingarligum rakstraruppgávum í undirvísingarverkinum. Sí nærri lýsing á www.uvs.fo*